


betri
DEILDIN

DYSTARSKRÁ

12. UMFAR **04/06/2023**

# B36 v VÍKINGUR

#VITERUB36

Joma®
ANDY ROBSON TIPS
J&K PETERSEN

J&K

J&K PETERSEN
www.jkp.fo

Jolly




# FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36
FC Tórshavn

Gundadalur, Postboks 1136
FO-110 Tórshavn, Føroyar
tel. +298 311936, fax +298 318036
b36@b36.fo

Kontonummar (Limagjald og stuðul):
9181 495.136.2 í Betri Banka

**www.b36.fo**

**Ábyrgd:** B36

**Myndir:** Bjarni Enghamar, Álvur Haraldsen, Sverri Egholm og onnur

FAROE SOCCER.com

TEL
20 59 59

uno
eitt og alt

- Hvítvørur
- Køkar
- Baðirúmsmøblar
- Súkklur
- Skápsloysnir
- Brúsukabinur
- Vesikummur

# KVINNURNAR ERU Á RÆTTARI LEIÐ

Besta kvinnuliðið er við í stríðnum um heiðursmerki eftir fyrstu átta landskappingardystirnar. Seinasta umfarið kiksaði tað eitt sindur, tá NSÍ tók stigini her í Havn.

Í dag eitur mótstøðuliðið HB, og tað gekk framúr væl, tá vit seinast hittu grannarnar. Ta ferðina hildu vit okkara avtalur á vøllinum, og tá vit í evstu løtu fingu sigursálið við beinleiðis frísparki, var hetta ikki meira enn uppiborið, tí vit vóru støðugt betra liðið í dystinum.

Kvinnuliðið hevur verið í stórari menning seinastu árini. Farið var undir eina longri tilgongd fyri tveimum árum síðan, har málið var byggja eitt lið upp, sum skal vera fastur partur av toppinum í føroyskum kvinnufótbólti. Higartil hevur tað eydnast væl. Úrslitini hava sveiggjað nakað, men venjingarmentanin er styrkt, úrslitini verða støðugt frægari, og spælarar eru komnar afturat, so tað er kapping um plássini.

Jan Poulsen fekk brádliga høvuðs-ábyrgdina herfyri, tá Tummas Erling Djurhuus valdi at taka við øðrum



el | net
Tel 60 00 60

Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
faroeship.fo
FAROE SHIP


MAGN KAFFI
Føroyar
MAGN KAFFI
NÝMALIÐ · VISTFRØÐILIGT
magn
MAGN KAFFI
Føroyar
magn
MAGN KAFFI
NÝMALIÐ · VISTFRØÐILIGT

*... framhald frá síðu 10*




venjarastarvi. Tummas Erling hevur vant kvinnuliðið seinastu tvey árini, men brádliga stóð honum í boði at venja besta mansliðið í barndómsfelagnum TB.

- Tað kom sjálvandi dátt við, at hann gavst, tí tað kom so brádliga. Eg skilji kortini væl, at hann tók við hasari spennandi uppgávuni. Vit og øll í B36 ynskja Tummas Erling alt tað besta og takka honum fyri stóra arbeiðið, sum hann gjørdi í B36. Vit gleða okkum eisini

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



Vitja handil okkara á Hjalla



Her fært tú alt til vask og reingerð á einum stað

KEMILUX

FAROE AGENCY

www.faroeagency.fo




at síggja hann aftur í B36-húsinum í framtíðini, sigur Jan.

Ambitiónirnar eru kortini tær somu. Kvinnurnar hava sett sær fyri at røkka einum betri úrsliti enn í fjør, tá ið avrikini rukku til fjórða plássið í landskappingini. Higartil í ár er úrtøkan 12 stig fyri sjey dystir, og B36 er eisini nummar fýra í røðini undan hesum dystinum.

- Vit hava lagt sera stóra orku í hetta, og byrjanin hevur ikki verið nøktandi,


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!

*... framhald frá síðu 13*

um vit meta eftir stóra arbeiðinum, sum vit hava lagt í fyrireikingarnar til hetta kappingarárið. Vit hava eisini spælt onkrar dystir, sum vit burdu vunnið, men soleiðis er fótbóltur eisini. Tað ræður um at taka av, tá ið møguleikin býðst. Tá ið tað er sagt, so hava vit spælt flestar dystir ímóti liðum, sum eru ovarliga á stigatalvuni. Vit eru heilt vist á rættari leið. Skaðar darva framvegis í hópinum, men eg ivist ikki í, at tá allar eru tøkar, so spæla vit við har, sum tað er stuttligast, sigur Jan Poulsen.




BYGMA
BALSLEV
STOLTIR LIÐSPÆLARAR
HJÁ B36
Bygma Balslev - Vegurin Langi - Tel. 345000 - balslev.fo

# DANN VERÐUR SITANDI

**Fríggjadagin kundi B36 almanna-kunngera, at Dan Brimsvík eisini fer at standa við stýrisvølin hjá besta mansliði okkara í 2024 og 2025.**

Dan hevur altíð havt B36 í blóðinum, og longu blaðungur stóð hann á odda fyri ungdómsdeildini hjá okkum, umframt at hann ta eina árið vandi næst besta mansliðið - við góðum úrslitum.

Í fleiri ár var hann í Danmark, har hann nam sær A-prógv og útbúgving innan ítrótt, og har hann eisini stóð á odda fyri U15-liðnum hjá Lyngby, sum má metast sum ein tann størsti klekingardepilin í donskum fótbólti. Ætlandi skuldi hann


Alt innan grill til summarhugnan
weber
Fønix
Mykinesgøta 8 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 19 09 • www.fonix.fo


SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




koma heim á vetri 2020, har hann aftur skuldi standa á odda fyri ungdómsdeildini, áðrenn hann ætlandi skuldi gerast nýggjur høvuðsvenjari í 2022.

Hetta broyttist tó eitt sindur, tá felagið brádliga skuldi hava nýggjan høvuðsvenjara. Ein steypakapping skuldi spælast á hávetri og B36 vantaði tann rætta persónin at taka týðandi uppgávuna. Dan var tó til reiðar at traðka til alt fyri eitt, soleiðis at tíðarætlanin varð framskundað. Hálvfinalan hetta árið varð tapt móti Víkingi, og heldur seint fór

ANDY ROBSON
TIPS



TÁ RÆTT
SKAL
VERA
RÆTT

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

*… framhald frá síðu 19*

Dan soleiðis undir fyrireikingarnar til eitt nýtt kappingarár, har hann stóð við høvuðsábyrgdini.

Dan hevur nú staðið á odda fyri besta liðnum í barndómsfelagi sínum í 2021, 2022 og nú í 2023.

Sjálvt um vit eiga stóra úrslitið í landskappingini til góðar, hava vit vunnið stórar løtur og dystir saman við Dan Brimsvík.

Størsta einstaka løtan, sum eisini uttan iva var ein sera týðandi løta fyri Dan og felagið, var Løgmanssteypið í 2021.

Men tað kunnu vit ikki nevna uttan at eisini minnast stóru løturnar og megnar avrikini í Conference leauge í fjør summar. Ikki minst framúr avrikið á heimavølli móti Banja Luka, tá vit gjørdust fyrsta føroyska felagið at venda útivallartapi til samlaðan sigur.




- Vit í B36 eru sera nøgd við arbeiðið hjá Dan Brimsvík og eru glað fyri, persónin, Dan Brimsvík. Eitt er, at hann stendur ið høvuðsábyrgdini fyri besta mansliðið. Men samstundis hevur hann ein stóran fingur og brennandi eldhuga at menna B36 í síni heild. Tí var hetta ein einføld avgerð at taka fyri B36.

- Eg eri sera fegin um, at Dan hevur longt sáttmálan. Og eg kann bara staðfesta, at vit í B36 gleða okkum til samstarvið komandi árini, sigur Marita Debess Magnussen, forkvinna.




# B36-HÚSIÐ ER VÆL ÚTGJØRT TIL FLEST ØLL TILTØK

Umleið 180 fólk sita væl til borðs í senn í tí stóra salinum.
Køkurin er væl útgjørdur við øllum hentleikum.
Leigukostnaðurin er kr. 9.000,- fyri eitt kvøld.

* Eykagjald fyri reingerð er kr. 1.500,-

Tosa við B36 fyrst, tí so er óneyðugt at tosa meir !

Ring til Angeleen á **252040**

**www.b36.fo**



DPR
SNIKKARAVIRKIÐ

Akranesgøta 4 Tórshavn tel. 317082 **www.dpr.fo**

# ER BÁTURIN KLÁRUR?

## VITJIÐ SØLUBÚÐ OKKARA!

- Máling (Hempel)
- Zinkklossar
- Reinsi- og vaskievni (Hempel)
- Penslar og tilfar

**Taka bátin upp ella sjóseta?**
**Ring til MEST á tlf 301100**

MEST P/F
J.C. Svabosgøta 31
P.O.BOX 65
FO-110 Tórshavn

tel:+298 301100
fax:+298 301101
info@mest.fo
www.mest.fo







KE BUSSKOYRING

*...Vit hava altíð ein buss*

***Ring 210165***



# TAUFFE HEVUR FINGIÐ LANDSLIÐSBOÐ

Tað verður við Taufee Skandari í spælarahópinum, at Afganistan fer at spæla CAFA Nations Cup í Kyrgistan og Usbekistan í juni.




Ágangandi álopsspælarin við góða bóltførleikanum hevur fingið landsliðsboð fyri fyrstu ferð.

- Eg var heima og tosaði í telefon við nakrar vinmenn, tá ið umboðsmaðurin skrivaði mær eini boð og bað meg ringja skjótast tilber. Hann segði seg hava stórtíðindini at bera mær. Eg var sjálvsagt ógvuliga forvitin, segði vinmonnunum farvæl og ringdi til hansara beinanvegin. Eg var sera kløkkur av at hava fingið landsliðsboð, tí afganska landsliðið er gott. Hvøkkurin hevur nú lagt seg, og

*... framhald frá síðu 27*

eg eri til reiðar til stóru og spennandi uppgávuna, sigur hann.

CAFA Nations Cup er nýggj kapping við sjey liðum, sum miðasiatiska fótbóltssamgongan CAFA skipar fyri. Hetta er fyrstu ferð, at kappingin skal spælast, og kappingarleisturin er einfaldur. Sjey lið eru býtt í tveir bólkar, har báðir bólkavinnararnir spæla finalu. Afganistan er í bólki saman við Kyrgistan og Iran. Hini luttakandi liðini eru Usbekistan, Tajikistan, Turkmenistan, umframt vesturasiatiska Oman, sum hesaferð er boðið við í kappingina. Ætlanin var eisini, at Russland skuldi vera við í kappingini, men russiska fótbóltssambandið gav avboð í apríl. Kappingin verður í døgunum frá 10. til 20. juni.

Hetta verður somuleiðis fyrsta uppgávan hjá landsliðsvenjaranum Abdullah Al

THETIS




Timbur- & snikkaraarbeiði
Vit átaka okkum alt arbeiði innan fyri bygging, umbygging og umvæling.
DygdarVerk
v/Jens Kristian Hansen, Bygningssnikkari • Tel. 56 30 30 • dygdarverk@gmail.com

*... framhald frá síðu 28*

Mutairi, sum tók við starvinum fyri góðum mánaða síðan. Hann er føddur í Kuwait og hevur fyrr staðið á odda fyri landsliðnum í Nepal.

- Eg havi frætt, at hann hevur hugt víðað fyri at vita, hvussu hann kann styrkja og breiðkað spælarahópin, og nú eri eg eisini komin upp á tal, sigur hann. Í løtuni er Afganistan styrkismett sum nummar 155. Føroyar eru nummar 125.

24 ára gamli Taufee Skandari var føddur í Afganistan í apríl 1999, men flutti árið eftir við familjuni til London. Sum fótbóltsspælari hevur hann ferðast víðað. Hann hevur fyri tað mesta spælt í teimum lægru ensku fótbóltsdeildunum, har hann hevur umboðað FC Windsor, Woodford Town, Northwood FC, Ware FC og New Salamis. Eitt skifti royndi hann seg eisini í SK Bischofshofen í triðbestu deildini í




# FYRSTA FLOKS FLAK BEINLEIÐIS ÚR HAVINUM

# P/F ENNIBERG

*... framhald frá síðu 30*

Eysturríki, og á U21-liðnum hjá turkiska Bursaspor.

- Mín stóri fótbóltsdreymur er sum hjá øðrum at spæla í bestu ensku fótbóltsdeildini, men tað hevði eisini verið ómetaliga stórt fyri meg, familjuna og øll fólkini har heima, um tað lukkast at spæla Afganistan til heimsmeistarakappingina, sigur hann.

Í strembanini eftir at røkka sínum dreymum, kom Taufee til Føroya og B36 í vetur. Avrikini hava verið góð og støðug, og hagtølini siga, at hann hevur higartil skotið tvey mál og átt trý upplegg í tólv dystum.

- Eg trívist væl í Føroyum. Hetta er eitt stimbrandi og fjálgt fótbóltsumhvørvi, og spælararnir, venjaratoymið og øll rundan um felagið hava tikið seg væl ímóti mær.

Nomi
Smykkur & Ur

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

*... framhald frá síðu 32*

Tað einasta, sum eg eri ovfarin av, er veðrið. Eg visti frammanundan, at tað er kalt í Føroyum, men eg visti ikki, at veturin fór at vera so harður. Nú havi eg vant meg við tað, sigur Taufee Skandari brosandi.

B36 ynskir Taufee til lukku við úttøkuni allar bestu eydnu við landsliðsuppgávuni.



# Hví eiga, tá ið **tú kanst leiga?**





**HÜNNEBECK**

- borgar fyri góðsku

**Kaj Andreasen & Co**

Tit hava tørvin - vit eru veitarin







Skraddaraseymaðar loysnir

## Veitari til føroysku vinnuna

Hjá Solar menna vit áhaldandi vørur og tænastur. Hetta optimerar bæði arbeiðsgongdina hjá viðskiftafólki okkara og okkara samskifti við viðskiftafólkið. Vit hava gjørt okkum royndir líka síðan fyritøkan varð grundað í 1919, og hava tí havt góða tíð at menna eitt framúrskarandi úrval av vørum og tænastum.

Vit læra av viðskiftafólki okkara, og í tøttum samstarvi menna vit støðugt teir førleikar, sum vit longu hava. Vit bjóða meira enn bara eina vøru, av tí at vit fara inn í eitt tætt samstarv við kundan fyri at hjálpa at optimera arbeiðsgongdina.

Ring 35 79 33 og hoyr nærri

Solar Føroyar P/F   Brekkutún 2   Hoyvík   tel. 35 79 33   solar@solar.fo   www.solar.fo




**Fáar tímar, áðrenn** dysturin hjá okkum móti AB varð bríkslaður ígongd mánadagin, gjørdust Dan Brimsvík og Lena Guttesen foreldur fyri triðju ferð. Tey fingu eina deiliga gentu í verðina, meðan hópurin fór undwir fyrireikingarnar til dyst í Gundadali.

Fótbóltur kann til tíðir kennast sum tað týdningarmesta sum er til, men einki

# SAFARI TRANSPORT

**TEL 32 22 22**

DØGNVAKT 22 22 22

FLOGFRAKT

SJÓFRAKT

SKUNDFRAKT

FLYTIGÓÐS

VANDAMIKIL EVNI

LÍK

DJÓR

LAGUR-HOTELL

AVTALU-FRAKT

TOLL-AVGREIÐSLA

SAFARI GER LÍVIÐ LÆTTARI

*... framhald frá síðu 37*

er størri enn børnini og løtan tá barnið kemur í heimin.

Og soleiðis bleiv hjá Dan og Lenu mánadagin. Tey vistu longu sunnukvøldið, at Dan fór at standa undir liðuni hjá Lenu á føðideildini heldur enn við síðulinjuna hjá leikarunum á ovara vølli.

- Dóttirin varð fødd í øllum góðum, og eg fekk stundir at síggja dystin á telduni, segði Dan, tá bæði føðing og dystur vóru liðug í øllum góðum.

- Sjálvt um náttin á føðideldini gjørdist drúgv, so vóru hasir 90 minuttirnir við telduna serliga harðir, sigur hann við einum smíli

B36 ynskir Dan og Lenu hjartaliga til lukku við dótturini og alt tað besta í nýggju tilveruni sum familja við trimum børnum.



**Shisa Brand**
Faroe Islands

VITJANDI LIÐIÐ

# VÍKINGUR

1 Bárður á **REYNATRØÐ** (M)
2 Andreas Lava **OLSEN**
3 Signar á **BRÚNNI**
4 Atli **GREGERSEN**
7 Jákup **JOHANSEN**
8 Bergur **GREGERSEN**
9 Martin Klein **JOENSEN**
10 Sølvi **VATNHAMAR**
11 Olaf **BÁRÐARSON**
14 Ingi **JONHARDSSON**
15 Géza Dávid **TURI**
16 Páll Eirik **DJURHUUS**
17 Finnur **JUSTINUSSEN**
18 Arnbjørn **SVENSSON**
19 Aron Jarnskor **ELLINGSGAARD**
22 Ari **OLSEN**
23 Poul **KALLSBERG**
25 Hans Jákup **ARNGRÍMSSON**
27 Áki **MAGNUSSEN**
29 Ingi **ARNGRÍMSSON**
30 Árni Nóa **ATLASON**

**Venjari** Jóhan Petur **Poulsen**

HVÍTTKLÆDDA HEIMALIÐIÐ

# B36 TÓRSHAVN

1 Mattias **LAMHAUGE** (M)
2 Andrias **H. ERIKSEN**
3 Jann Julian **BENJAMINSEN**
4 Ísak **JONSSON**
5 Sonni Ragnar **NATTESTAD**
6 Eli **FALKVARD NIELSEN**
7 Bjarki **C. NIELSEN**
8 Taufee **SKANDARI**
9 Hannes **AGNARSSON**
10 Valerijs **SABALA**
11 Benjamin **HEINESEN**
12 Mattias **J. HELLISDAL**
13 Emil **WEIHE JOENSEN**
14 Rani **Í SOYLU**
16 Magnus **EGILSSON**
17 Mattias **WEIHE JOENSEN**
19 Erlendur **MAGNUSSON**
20 Andrass **JOHANSEN**
22 Símun **SÓLHEIM**
23 Carl **MIKKELSEN**
25 Silas **EYÐSTEINSSON** (M)
27 Aron **KNUDSEN**
28 Michal **PRZYBYLSKI**
30 Marius **ÁRTING ALLANSSON**

**Venjari** Dan Brimsvík
**Hjálparvenjari** Mikkel Richardt Mortensen

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN

HØVUÐSSTUÐLAR HJÁ B36:

---

J & K PETERSEN

EST. 2017 HAPS BURGARABARR

ANDY ROBSON TIPS

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

RASKA ·1977·

PIZZA 67

magn

LAVAZZA

SUÐUROYAR SPARIKASSI

PETUR LARSEN Since 1971

Ford

Jolly

GEISA GRILL BARR

Yndi

THETIS

FISHPROTEIN

motussport.com

Joma

Fønix

BYGMA BALSLEV

Maria Poulsen

FAROE SHIP

MTV - Byggivirkið
Sethús í elementum, ein skjót og dygdargóð loysn
Tlf: + 298 371787 Mob: + 298 214587 mtv@olivant.fo
Fax: + 298 372787 Mob: + 298 284769 www.mtv.fo